# ÁRSFRÁGREIÐING 2019

www.als.fo




ALS

# INNIHALD

**ÁTEKNINGAR**

Leiðsluátekning 4

Váttanir frá óheftum grannskoðara 5

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

Upplýsingar um grunnin 8

Høvuðs- og lyklatøl 9

Leiðslufrágreiðing 10

Búskapur 30

**ÁRSROKNSKAPUR**

Nýttur roknskaparháttur 44

Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2019 47

Fíggjarstøða tann 31. desember 2019 48

Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2019 50

Notur til ársfrásøgnina 52

**ALS - Ársfrágreiðing 2019**

**Myndir**: ALS, Faroephoto, Sansir.

**Sniðgeving og uppseting**: Sansir
**Prent og liðuggerð**: Føroyaprent

# Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2019 hjá Arbeiðsloysisskipanini. Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Stjórnin og stýrið meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2019 umframt av úrsliti og peningastreymum grunsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn, tann 17. juni 2020

**Stjórn**

Magni á Deild Olsen
stjóri

Eyðfinnur Jacobsen
formaður

| | | |
|---|---|---|
| Magnus Pauli Glerfoss | Georg F. Hansen | Stefan í Skorini |
| Jan Mortensen | Marita Rasmussen | Óluva í Gong |



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## Til leiðsluna í Arbeiðsloysisskipanini

**Grannskoðanarátekning á ársroknskapin**

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt grunnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka grunnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini.

Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt grunnurin megnar at halda fram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at grunnurin ikki er førur fyri at halda fram við rakstrinum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.



# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini

Tórshavn, hin 17. juni 2020

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f



Jóhannes Færø
statsaut. revisor

# Upplýsingar um grunnin

### GRUNNURIN

**ALS**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
Telefon: 349550
Heimasíða: www.als.fo

Roknskaparár: 1. januar - 31. desember

### STÝRIÐ

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg F. Hansen
Stefan í Skorini
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Jan Mortensen

### STJÓRN

Magni á Deild Olsen, stjóri

### GRANNSKOÐAN

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn



# Høvuðs- og lyklatøl

Gongdin seinastu fimm árini kann lýsast við hesum høvuðs- og lyklatølum:

| | **2019** tkr. | **2018** tkr. | **2017** tkr. | **2016** tkr. | **2015** tkr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| Nettoinngjøld | 245.151 | 231.859 | 220.898 | 210.145 | 202.206 |
| Bruttoúrslit | 189.510 | 155.577 | 130.856 | 98.887 | 61.928 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 174.940 | 140.553 | 115.300 | 83.776 | 45.303 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | 26.065 | -8.324 | 10.331 | 11.309 | 5.221 |
| **ÁRSÚRSLIT** | **199.694** | **131.277** | **124.637** | **93.936** | **49.025** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 916.652 | 717.169 | 586.712 | 463.732 | 369.473 |
| Íløgur í materiella støðisogn | -1.164 | -1.434 | -6.460 | 0 | 0 |
| **EGINOGN** | **910.968** | **711.274** | **579.997** | **455.359** | **361.424** |
| | | | | | |
| **Peningastreymur frá:** | | | | | |
| - rakstrarvirksemi | 198.975 | 130.722 | 122.616 | 94.908 | 50.927 |
| Starvsfólkatal | 29 | 33 | 35 | 34 | 43 |
| | | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 19,1% | 19,6% | 19,7% | 18,1% | 12,2% |
| Tryggleikastig | 99,4% | 99,2% | 98,9% | 98,2% | 97,8% |
| Eginpeningsavkast | 24,6% | 20,3% | 24,1% | 23,0% | 14,6% |

# LEIÐSLU-FRÁGREIÐING **2019**

## Jaliga gongdin, sum hevur verið í fleiri ár í Føroyum, helt fram í 2019

Talið av fólkum, sum býr í Føroyum, hevur ongantíð verið hægri, enn tað er nú. Arbeiðsloysið er metlágt, arbeiði hevur verið til so at siga allar hendur, og samlaðu lønarútgjaldingarnar hava ongantíð verið hægri, enn tær vóru í 2019.

Við árslok var arbeiðsloysið komið niður á 0,9%, sum er tað lægsta nakrantíð í Føroyum, síðani Hagstovan fór at skráseta arbeiðsloysið í Føroyum í 1995.

Eins og undanfarin ár hevur tað verið ein støðugur meldur av fólki, sum fara av arbeiðsmarknaðinum, og sum eftir lutfalsliga stutta tíð eru farin aftur á arbeiðsmarknaðin í eitt nýtt starv. Tey flestu verða søgd úr starvi, men nú eru tað lutfalsliga fleiri, sum sjálvi velja at siga seg úr starvi – kanska tí tey vilja hava ein steðg frá arbeiðinum ella tí, tey leita sær eftir øðrum arbeiði og nýggjum avbjóðingum.

Í 2019 vóru tað 679 fólk, sum komu í Arbeiðsloysisskipanina, meðan tað vóru 719, sum fóru úr skipanini. Hetta er tað lægsta talið av nýggjum fólkum í Arbeiðsloysisskipanini seinastu 12 árini.

Aftur í 2019 sást jaliga gongdin í samfelagnum aftur í fíggjarviðurskiftunum hjá Arbeiðsloysisskipanini, og fíggjarliga royndist 2019 væl og munandi betri enn árið frammanundan. Inngjøldini vóru tey hægstu, síðani ALS var stovnað í 1992, og samstundis var samlaða útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli tað lægsta síðani 2008.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 199,7 mió. krónur, sum er tað mesta í søguni hjá ALS.

Við góða úrslitinum fyri 2019 er samlaða avlopið, síðani gongdin vendi fyri átta árum síðani, komið upp á 604 mió. krónur. Harvið er Arbeiðsloysisskipanin styrkt nógv seinastu árini, og fíggjarliga er skipanin sera væl fyri.

Við árslok var eginognin 911 mió. krónur, sum er tað mesta nakrantíð, og við hesi eginognini megnar ALS at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í oman fyri 8 ár, áðrenn skipanin verður insolvent. Arbeiðsloysið hevur ikki verið 8% síðani 1997 stutt eftir stóru kreppuna, sum tá var.

Stýrið og stjórn fegnast um, at úrslitið í 2019 gjørdist so gott, tí skal skipanin hava neyðuga fíggjarliga máttin at standa ímóti við, tá tíðirnar aftur fara at versna, er tað alneyðugt at styrkja skipanina, nú hákonjunkturur er, og arbeiðsloysið er lágt.

Stýrið fyri ALS hevur sett sær sum mál, at Arbeiðsloysisskipanin skal javnviga fíggjarliga, tá arbeiðsloysið er millum 4,25% og 4,50%. Hetta markið hevur støði í søguliga arbeiðsloysinum og merkir, at tá arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25 til 4,5%, skal skipanin hava avlop, meðan hon kann hava hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%. So hvørt sum virksemið í Føroyum er vaksið, talið av løntakarum er hækkað, eins og samlaðu lønargjaldingarnar eru hækkaðar, so er markið fyri, nær arbeiðsloysið verður so høgt, at raksturin hjá ALS gevur hall, eisini hækkað, og sum støðan er nú, so kann arbeiðsloysið fara upp um 5%, áðrenn raksturin gevur hall.

Arbeiðsloysið við árslok 2019

**0,9%**

2018: 1,4%

# Metlágt arbeiðsloysi

Í januar og februar mánaði í 2011 var arbeiðsloysið tað hægsta í nýggjari tíð. Tá var tað 7,4%. Síðani er tað støðugt lækkað, og við árslok í 2019 var arbeiðsloysið komið niður á 0,9%. Hetta er tað lægsta arbeiðsloysið, sum nakrantíð er skrásett í Føroyum yvirhøvur. Tá vóru bara samanlagt 300 fólk í Føroyum rakt av arbeiðsloysi.

Eitt ár frammanundan – við árslok 2018 – var arbeiðsloysið 1,3%.

Tað vóru í miðal 201 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørja ferð, arbeiðsloysisstuðul varð útgoldin í 2019. Í 2018 vóru tað í miðal 322 fólk, sum fingu arbeiðsloysisstuðul hvørt útgjaldsskeið.

Afturat hesum 322 fólkunum koma tey, sum fingu forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum.

Í miðal fyri alt 2018 vóru 513 fólk fulltíðararbeiðsleys. Tað svarar til 1,8% í miðal fyri alt árið. Í 2019 var talið av fulltíðararbeiðsleysum 327, sum svarar til 1,1%. **Sí mynd 01.**

**Mynd 01** / Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini - ársmiðal




# Gongdin í 2019

So við og við sum arbeiðsloysið minkar, gerast sveiggini í arbeiðsloysinum eisini minni. Í 2018 sveiggjaði arbeiðsloysið millum 2,6% við ársbyrjan og 1,2% tá tað, var lægst í oktober og november mánað tað árið. Í 2019 var arbeiðsloysið enn støðugari og lækkaði úr 1,3% við ársbyrjan niður í 0,9% við árslok. Arbeiðsloysið var støðugt 0,9% allar fýra mánaðirnar frá september til desember í 2019. **Sí mynd 02.**

**Mynd 02** / Arbeiðsloysið 2018 og 2019







# Alsamt færri nýggj komu í skipanina

Sum arbeiðsloysið minkar, eru tað eyðsæð færri, sum koma í Arbeiðsloysisskipanina, meðan fleiri fara úr henni.

Hóast arbeiðsloysið var metlágt í 2019, so vóru tað hóast alt fleiri fólk, sum vóru arbeiðsleys í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað komu samanlagt 995 nýggj fólki í ALS í 2018, meðan 1.177 fólk fóru úr skipanini. Í 2019 komu 679 nýggj fólk í skipanina, meðan 719 fóru úr henni.

Av hesum eru nøkur, sum hava verið arbeiðsleys í fleiri umførum. **Sí mynd 03.**

**Mynd 03** / Tal av stovnaðum og strikaðum arbeiðsloysum



# Føroyar hava lægsta arbeiðsloysið

Sætta árið á rað var arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í 2019 tað lægsta yvirhøvur samanborið við onnur lond í Evropa.

Arbeiðsloysið í serliga Íslandi hevur verið lágt seinastu tvey-trý árini, men í 2019 vaks arbeiðsloysið í Íslandi nógv, og tað eru nú fleiri lond í ES, har arbeiðsloysið er lægri enn í Íslandi.

Arbeiðsloysið í Føroyum var, sum áður nevnt, 0,9% við árslok í fjør, og í Kekkia var tað 1,9% við árslok í fjør, og er tað tað næstlægsta samanborið við Føroyar og londini í ES. **Sí mynd 04.**




**Mynd 04** / Arbeiðsloysið í londunum í Europa í desember mánaði 2019

# Fleiri løntakarar

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst aftur í talinum av løntakarum, sum hevur verið vaksandi seinastu seks árini.

Ikki óvæntað er eitt ávíst samsveiggj millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum soleiðis, at tá talið av løntakarum veksur, so minkar arbeiðsloysið.

Tað er eisini eitt øvugt samsveiggj millum arbeiðsloysið og nettoflyting soleiðis, at tá arbeiðsloysið minkar, vísir tað seg, at nettoflytingin til Føroyar veksur – og øvugt. **Sí mynd 05.**

Við árslok í 2019 vóru tað 27.363 løntakarar í Føroyum. Hetta eru 652 løntakarar fleiri enn eitt ár frammanundan, og er eitt tað mesta, sum yvirhøvur er skrásett í Føroyum nakrantið. **Sí mynd 06.**

**Mynd 05** / Samsveiggj millum arbeiðsloysi og nettotilflyting




**Mynd 06** / Tal av løntakarum og tal av arbeiðsleysum 2010 til mars 2020



## Lønargjaldingarnar hækka

Tíggjunda árið á rað hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar í 2019 og fóru fyri fyrstu ferð upp um 10 mia. krónur. Neyva upphæddin var 10,06 mia. krónur. Tað eru 645 mió. krónur meiri enn í 2018 svarandi til ein vøkstur á 6,8%.

Fyrstu fimm mánaðirnar í 2020 vóru samlaðu lønargjaldingarnar 4,2 mia. krónur, sum vóru 110 mió. krónur – svarandi til 3,4% - meiri enn sama tíðarskeið í 2019.

Hóast løgmaður 12. mars boðaði frá, at Føroyar skuldi niður í ferð orsakað av vandunum við korona-smittuni, so var kortini ein vøkstur í samlaðu lønargjaldingunum hesar fyrstu fimm mánaðirnar av 2020 samanborið við sama tíðarskeið í 2019, og lønarútgjaldingarnar hesar fýra mánaðirnar hava eisini hvønn mánað sær verið hægri í 2020 samanborið við 2019 – tó undantikið mai mánað.

Tað ber boð um, at ein ítøkilig kreppa orsakað av korona-smittuni ikki sæst í Føroyum rættiliga enn. Men enn er ov tíðliga at siga, hvørjar langtíðar avleiðingarnar av korona-smittuni verða.

*Tað ber boð um, at ein ítøkilig kreppa orsakað av korona-smittuni ikki sæst í Føroyum rættiliga enn*




## Útlendingar í Føroyum

Nógva virksemið og stóri eftirspurningurin eftir skikkaðari arbeiðsmegi hevur havt við sær, at tað hevur staðið á at finna nøktandi tal av starvsfólki við røttu førleikunum. Tí hava fleiri føroyskir arbeiðsgevarar seinnu árini í vaksandi mun leitað sær uttanlands eftir nýggjum starvsfólkum.

Júst hvussu nógvir útlendingar arbeiða í Føroyum er ógreitt, tí útlendingamál verða fyrisitin av dønum, og haðani ber ikki til hjá ALS at fáa upplýsingar um talið av útlendingum í Føroyum. Sambært upplýsingum hjá Útlendingastovuni um latin uppihaldsloyvi – sum skulu tulkast við hóskandi fyrivarnum - so var ein vøkstur í talinum av útlendingum, sum komu til Føroyar at arbeiða í 2019. Talan var um vøkstur í talinum bæði av fólki, sum koma til Føroyar úr ES-londum, og eisini av fólki, sum koma úr øðrum londum enn ES-londum.

Tað er eyðsæð jaligt, at føroyskir arbeiðsgevarar hava henda møguleikan at leita sær arbeiðsmegi uttanlands, men á ALS høvdu vit ynskt, at hesir arbeiðsgevarar altíð fyrst vendu sær til ALS at vita, hvørt fólk við røttu førleikunum eru tøk her í Føroyum.

Sambært reglunum eru møguleikarnir hjá útlendingum at koma til Føroya at arbeiða avmarkaðir alt eftir, hvussu høgt arbeiðsloysið í Føroyum er. Er arbeiðsloysið í Føroyum í tríggjar fylgjandi mánaðir oman fyri 3,5%, so skal landsstýrið boða ríkisstjørnini frá hesum, og sambært reglunum verða tá ikki fleiri uppihaldsloyvi latin útlendingum. Tað er tó so, at um arbeiðsloysið er oman fyri 3,5%, men lægri enn 6%, so kunnu uppihaldsloyvi latast faklærdari arbeiðsmegi, sum koma til Føroyar at arbeiða í byggivinnuni – og bara byggivinnuni.

Enn er ov tíðliga at meta um, hvørjar avleiðingarnar av korona-smittuni verða, og um arbeiðsloysið fer at vaksa varandi, men tað er sannlíkt, at vanliga arbeiðsloysið fer at verða hægri í seinnu hálvu av 2020, enn tað hevur verið í fleiri ár, og tí er hugsandi, at møguleikarnir hjá útlendingum at koma til Føroyar at arbeiða fara at verða avmarkaðir av hámarkinum á 3,5%. Tað kann fara at hava við sær, at bert arbeiðs- og uppihaldsloyvi fara at verða longd og latin yrkislærdum, sum koma til Føroyar at arbeiða innan byggivinnuna.

**Mynd 07** / Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys – bert tey, sum eru farin úr ALS




**Mynd 08** / Miðallongd á arbeiðsloysum (kalendaradagar)




**Mynd 09** / Miðallongd á arb.loysi býtt á kyn og aldursbólkar 2018






# Fólk steðga styttri hjá ALS

Árini frá 2009 til 2013 vístu, at fólk, sum einki arbeiði høvdu, vóru alsamt longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 kalendaradagar – stívliga átta mánaðir.

Tann gongdin vendi í 2014, tá fólk fyri fyrstu ferð í fimm ár vóru styttri arbeiðsleys enn undanfarna ár, og henda gongdin hevur hildið fram í 2019.

Fólkini, sum fóru úr aftur ALS í 2014, høvdu í miðal steðgað 227 kalendaradagar, meðan tey, sum fóru úr skipanini í 2018, steðgaðu í miðal í 143 kalendaradagar hjá ALS. Hetta svarar til stívliga fýra og ein hálvan mánað.

Dagatalið fyri 2019 var 126 kalendaradagar, sum svarar til beint oman fyri fýra mánaðir. **Sí mynd 07.**

Tal av døgum, fólk í miðal hava verið arbeiðsleys

**126** dagar

2018: 143 dagar

Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, hava verið arbeiðsleys, so er myndin í stóran mun tann sama.

Tað vísir seg, at tíðarskeiðini, fólk hava verið arbeiðsleys, eru vorðin alsamt styttri síðani á sumri í 2012, og yvirhøvur hava fólk, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, verið nakað longri arbeiðsleys í miðal enn tey, sum eru farin úr skipanini.

Tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2018, høvdu í miðal verið í ALS í 159 dagar, meðan tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2019, høvdu í miðal verið í ALS í 156 dagar. Tey, sum vóru í skipanini í mái mánaði í 2020 høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 125 dagar.

Tá tað eru so lutfalsliga fá fólk í Arbeiðsloysisskipanini, so er skjótt at miðaltølini broytast, men tað er eyðsæð jaligt, at fólk eru styttri arbeiðsleys. Tað er júst eitt av aðalmál-unum hjá ALS, at fólk fara so skjótt aftur til arbeiðis ella undir útbúgving sum til ber.

Tað hevur eisini stóran búskaparligan týdning fyri ALS, at fólk steðga styttri, tí so verður minni rindað út í arbeiðs-loysisstuðli. **Sí mynd 08.**

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðs-loysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at koma út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hagtølini vísa eisini, at í øllum aldursbólkum uttan tey í tjúgunum eru tað kvinnurnar, sum hava verið longri arbeiðsleysar enn menninir. **Sí mynd 09.**

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðar-arbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðarafjøldini – minkar, so eru fólk yvirhøvur styttri arbeiðsleys. Tað vil siga, at tað ganga færri dagar frá tí, fólk gerast arbeiðsleys, til tey fara úr Arbeiðsloysisskipanini aftur, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys.

## Færri detta út

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysisskipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt fýra ára skeið.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so kann viðkomandi ikki longur fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk um árið, sum rukku fullum dagatali og duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks arbeiðsloysið nógv, og talið av fólkum, sum duttu úr skipanini, vaks eisini munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka.

Hóast talið enn er ov høgt – tí helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, ti tey hava brúkt allar 648 dagarnar – so er at fegnast um, at talið hóast alt er munandi lægri, enn tað var árini frá 2011 til 2013.

Hesi bæði seinastu tvey árini eru tað bara ávikavist 10 og 6 fólk, ið rukku teimum 648 døgunum og tí duttu úr skipanini. **Sí mynd 10.**

**Mynd 10** / Tal av fólkum, sum eru dottin út vegna fult dagatal




## Snýr seg framvegis um at fara fyrr aftur til arbeiðis

Hóast arbeiðsloysið framvegis er metlágt, er tað greiða sannføringin, at týdningurin av at hava eitt arbeiði at fara til hvønn dag hevur ovurstóran týdning fyri tey allar flestu.

Tí verður dentur áhaldandi lagdur á at virka fyri, at fólk fara sum skjótast aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg. Eisini fyri at tryggja, at føroyskir arbeiðsgevarar so skjótt og lætt sum til ber fáa starvsfólk við teimum førleikunum, teimum tørvar.

Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðsgevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, hevur alstóran týdning, og stórur dentur verður lagdur á hendan partin.

Síðani Fjølsmiðjan í februar mánaði í 2016 flutti oman í bygningin hjá Havnar Arbeiðarafelag á Tinghúsvegnum, hava øll starvsfólkini hjá ALS verið savnað í umhvørvinum á Tinghúsvegnum.

Í juni mánaði í 2017 keypti ALS grannabygningin á Tinghúsvegnum frá Losjuni, og tann parturin av virkseminum hjá Fjølsmiðjuni, sum var í bygninginum hjá Havnar Arbeiðarafelag, er fluttur yvir í Losjuna. Fjølsmiðjan fer kortini ikki at nýta alla Losjuna, og ein partur av bygninginum verður tí leigaður út. Millum onnur leigar Semingsstovnurin partar av eini hædd í Losjuni.

Ymsu arbeiðsmarknaðarátøkini, sum ALS tekur stig til, og virksemið í Fjølsmiðjuni hava alstóran týdning í mun til at knýta sambond við viðskiftafólkini. Royndirnar seinastu árini hava verið góðar, og tær hava týðiliga víst, hvussu týdningarmikil hesin parturin av virkseminum er.

Lága arbeiðsloysið hevur við sær, at tað ber til at røkka størri part av hesum viðskiftafólkum og at røkka teimum fyrr. Tí verða nú øll viðskiftafólk boðin at hitta okkum heilt skjótt eftir, at tey eru komin í skipanina. Tey verða kallað inn til starvsprát longu á leið ein mánað eftir, at tey er vorðin arbeiðsleys, og tey, sum framvegis eru í skipanini eftir tveimum mánaðum, fáa boð at møta í Fjølsmiðjuni. Í sambandinum við viðskiftafólkini verður stórur dentur lagdur á týdningin av at koma aftur á arbeiðsmarknaðin



*Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær*

skjótast til ber. Tosað verður m.a. um styrkir, møguleikar og avbjóðingar, og vit eggja viðskiftafólkunum at síggja alternativar møguleikar. Vit fyrireika tey eisini at søkja størv og at fara til starvssamrøður, og teimum, sum tørvar hjálp, veita vit tað í tann mun, vit kunnu.

Týðandi partur av virkseminum í Fjølsmiðjuni er eisini tað, ið fer fram á breytunum. Tær eru tríggjar í tali – timburbreyt, kreativ breyt og køksbreyt. Umframt at vera karmar um at hitta starvsfólkini og knýta tættari sambond við tey, so fáa viðskiftafólkini høvið at royna seg við ymsum framleiðslum á breytunum.

Umframt m.a. samrøður, starvsprát og virksemið á breytunum verður eftir tørvi eisini skipað fyri øðrum átøkum og skeiðum.

Tey ungu er ein serligur bólkur, sum vit vísa serligan ans. Tey hava meiri avmarkaðar arbeiðsroyndir, og eru í fleiri førum ikki so væl útbúgvin, sum tey nakað eldru fólkini, og tí verður stórur dentur lagdur á at stuðla teimum í at koma sum skjótast aftur til arbeiðis. Vit fegnast um, at talið av ungum í Arbeiðsloysisskipanini er sera lágt, ja kanska so lágt, sum tað ongantíð hevur verið áður.

Í kjalarvørrinum av korona-smittuni eru fleiri størv, sum ung fólk vanliga hava havt, horvin. Tí er vandi fyri, at arbeiðsloysið millum ung kann fara at verða hægri, enn tað hevur verið. Komandi tíðina verður tí serligur tørvur á at stuðla hesum fólkunum í at koma aftur til arbeiðis ella at fara at útbúgva seg.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun eiga vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð at hava í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin í ta keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum.




*Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og millum annað verða mentar nýggjar tænastur, sum fara at verða tøkar á Vanganum*



## Kunningartøkni

Kunningartøkni er og verður ein alt meiri týðandi partur av gerandisdegnum, og tað eru fleiri ymiskar kt-skipanir, ið vera nýttar á ALS. Summar eru standardskipanir, meðan aðrar eru serligar skipanir, sum tað, hóast keyptar uttanífrá, er neyðugt at laga til, so tær standa mát við tørvin hjá ALS. Aftur aðrar eru so serligar, at neyðugt er at menna tær júst til ALS. Dømi um tað er fakskipanin, nevnd Smúffan, sum er ment innanhýsis av starvsfólki hjá ALS.

Hendan skipanin er skræddaraseymað til virksemið og tørvin hjá ALS. Hon varð tikin í nýtslu í desember mánaði í 2015, og royndirnar við Smúffuni hava verið góðar. Skipanin ger, at arbeiðið er vorðið léttari, skjótari og tryggari, og ein vinningur við Smúffuni er, at síðan hon varð tikin í nýtslu hevur borið til at flutt arbeiðsorku til onnur øki innanhýsis, har tørvurin hevur verið størri.

Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og millum annað verða mentar nýggjar tænastur, sum fara at verða tøkar á Vanganum, sum er heitið á nýggja tænastuportalinum hjá Talgildu Føroyum.

Tað fyrsta, sum verður tókt á Vanganum, verður eitt talgilt umsóknarblað, og seinni verða eisini onnur oyðibløð og aðrar tænastur tøkar á Vanganum. Tá talgildi samleikin verður tøkur seinni í 2020, fara viðskiftafólk talgilt sjálvi at kunna fylla út umsóknarbløð um arbeiðsloysisstuðul og har nýta talgilda samleikan, sum er partur av Talgildu Føroyum.

Saman við Trygdargrunninum er ALS ein av stuðlunum hjá Talgildu Føroyum. ALS hevur játtað at stuðla við 1,6 mió. krónum í eitt fýra ára skeið, meðan Trygdargrunnurin stuðlar við 400 tús. krónum sama tíðarskeið.



## Eftirlitið umskipað og styrkt

Leisturin, sum innanhýsis eftirlitið hevur virkað eftir í nógv ár, varð broyttur fyri trimum árum síðani. Eftirlitið er styrkt og virkar nú í størri mun við at samankoyra ymsar skipanir og skráir, sum ALS hevur atgongd til.

Við broytingunum er eftirlitið vorðið neyvari, og úrslitini síggjast aftur. Komið er fram á fleiri viðskiftafólk, sum av órøttum hava fingið arbeiðsloysisstuðul, og sum ikki hava upplýst fyri ALS, at tey hava havt lønt starv, samstundis sum tey hava fingið útgoldið arbeiðsloysisstuðul.

Hetta eru álvarsmál, og eyðsæð verður arbeiðsloysisstuðulin, ið er goldin út av órøttum, kravdur aftur. Útgjøldini til oman fyri 1.000 persónar vóru kannaði í 2019. Av teimum vóru stívliga 200 mál kannað nærri, og úrslitið var, at oman fyri 500 tús. krónur í ov nógv útgoldnum stuðli eru kravdar aftur.

Síðani ALS fór undir at gera eftirlit eftir hesum nýggja leistinum, eru oman fyri 5.000 mál kannað nærri, og oman fyri seks mió. krónur í stuðli, sum er goldin av órøttum, eru kravdar aftur. Av hesi upphædd er ein stórur partur goldin ALS aftur, og har upphæddin ikki er goldin aftur, er afturgjaldsavtala gjørd við viðskiftafólkið.

Áhaldandi menning av nýggjari tøkni fer at hava við sær, at eftirlitið fer at verða enn neyvari og tryggari í framtíðini.

## Fiskavirkisskipanin

Tað eru ymisk lýti við verandi fiskavirkisskipan, og tørvur er á, at henda skipanin verður eftirhugd og lagað til tann tørvin, sum er í dag. Stýrið hevur ætlanir um at heita á landsstýrismannin við vinnumálum at gera ymsar broytingar í skipanini.

Til tess at tryggja eitt gott samband við fiskavirkini hevur ALS sett sær fyri at vitja øll føroysku fiskavirkini javnan – minst eina ferð um árið. Vitjað hevur verið á øllum virkjum, og tað er okkara fatan, at báðir partar fegnast um hesar vitjanir, sum geva eitt skipað høvi at tosa nærri um eitt nú royndir og avbjóðingar við fiskavirkisskipanini.




*Føroyingar, sum arbeiða uttanlands, kunnu í summum londum tekna arbeiðsloysistrygg-ing í landinum, teir arbeiða*

## Føroyingar uttanlands

Føroyingar, sum arbeiða uttanlands, kunnu í summum londum tekna arbeiðsloysisstrygging í landinum, teir arbeiða. Arbeiða teir í londum, har tað ikki ber til at tekna slíka trygging, ber til at tekna sjálvbodna trygging hjá ALS.

Teir føroyingar, sum arbeiða í øðrum norðurlondum, skulu sambært norðurlendsku avtaluni um almannatrygd sum meginregla vera tryggjaðir í landinum, teir arbeiða. Hesi kunnu tó sambært somu avtalu søkja um at verða undantikin meginregluna og í staðin vera tryggjað í landinum, tey búgva til dømis í Føroyum. Treytin fyri slíka undantøku er tó, at tað ber til at tekna trygging í landinum, tey búgva. Tað er eisini ein treyt, at avtala er millum londini bæði, sum loyvir slíkari undantøku.

Myndugleikarnir í Føroyum og í Noreg hava gjørt avtalu um, at føroyskir handverkarar og føroyingar, sum sigla í Noreg, kunnu vera almannatryggjaðir í Føroyum, hóast teir arbeiða í Noreg.

Hetta, at føroyingar, sum arbeiða í eitt nú Noreg, søkja um undantøku fyri at vera tryggjaðir í Noreg og í staðin vera tryggjaðir í Føroyum, hevur verið praktiserað í skjótt 20 ár uttan stórvegis avbjóðingar.

Í 2016 kom so tann støðan í, at føroyskur arbeiðsgevari bar seg undan at rinda arbeiðsgevarapartin av ALS-gjaldinum, tí viðkomandi vildi vera við, at ALS hevur ikki neyðugu heimildirnar at áleggja fyritøkuni at rinda ALS-gjald av lønum, hjá fólki, sum arbeiddu í Noreg. Orsøkin er, at tað í ALS-lógini stendur, at ALS-gjald verður bara goldið av a-inntøku, og at inntøkan, sum hesi fólk hava, skattliga ikki er at meta sum a-inntøka.

Málið endaði í Føroya rætti, har dómur var sagdur í mai mánaði 2017. Arbeiðsgevarin fekk viðhald í rættinum, og tað er staðfest, at ALS kann ikki áleggja hvørki arbeiðs-gevarum ella arbeiðstakarum at rinda ALS-gjald av øðrum inntøkum enn a-inntøkum.

Hetta hevur so havt við sær, at neyðugt verður at broyta ALS-lógina, so hesir persónar framhaldandi kunnu verða almannatryggjaðir í Føroyum, ynskja teir tað.

Uppskot um lógarbroyting, sum loysir hesar trupulleikar-nar, varð borið í løgtingið í oktober mánaði í 2018, men málið fall burtur, tá tingsetan endaði fyri summarfrítíðina í fjør.

# Eftirløn av arbeiðsloysisstuðli

Í sambandi við pensjónsnýskipanina, sum Føroya Løgting samtykti í apríl mánaði í 2018, er tað álagt ALS at rinda viðskiftafólkunum eftirløn av arbeiðsloysisstuðlinum. Eftirlønargjaldið er 5% frá 1. januar 2019, og síðani hækkar tað við einum prosentstigi árliga fram til 1. januar 2026, tá eftirlønin er komin upp á 12%.

Í 2019 rindaði ALS samanlagt 2,3 mió. krónur í eftirlønum av arbeiðsloysisstuðlinum.

Tað er staðfest, at undantøkan at rinda eftirløn av arbeiðsloysisstuðli er farin úr gildi, og tað áliggur tí ALS at rinda eftirløn av arbeiðsloysisstuðlinum. Hetta er møguliga nøktandi heimild, men tað er tó eisini ásett í ALS-lógini, at árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi 210.000 krónur.

Tá eftirløn verður løgd oman á arbeiðsloysisstuðulin, kann tað koma fyri hjá onkrum, at árligi arbeiðsloysisstuðulin fer upp um 210.000 krónur.

Stýrið hevur gjørt landsstýrismannin varðugan við tørvin á at nágreina heimildirnar at rinda eftirløn afturat arbeiðsloysisstuðlinum. Lógaruppskotið, sum var borið í løgtingið, men sum datt burtur, tá tingið fór í summarfrí í 2019, tók hædd fyri hesum, men av tí, at lógaruppskotið datt burtur, er tørvur á at taka hetta upp av nýggjum og fáa ALS neyðugu heimildirnar.

*Eftirlønargjaldið er 5% frá 1. januar 2019, og síðani hækkar tað við einum prosentstigi árliga fram til 1. januar 2026*

## Ársfundurin

Í mai mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin. Eingin ársfundur var í 2014, men hann hevur verið hvørt ár síðani.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina.

Ætlanin var, at ársfundurin skuldi vera 15. mai í 2020, men orsakað av vandunum við korona-smittuni var gjørt av at avlýsa ársfundin í ár.

Ætlanin er at halda ársfund aftur komandi ár.

# Lógarbroytingar

Fyri millum annað at tryggja langtíðarhaldbarið hjá Arbeiðsloysisskipanini, heitti stýrið í 2015 á landsstýrismannin við vinnumálum at gera ymsar broytingar í løgfrøðiligu karmunum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Fleiri av hesum broytingunum eru framdar, meðan aðrar enn mangla at verða framdar. Orskað av broyttum fyritreytum hevur stýrið heitt á landsstýrismannin at bíða við onkrum av hesum broytingunum, sum ikki eru framdar enn, tí neyðugt er at endurskoða broytingarnar, nú so langt er fráliðið, síðani stýrið vendi sær til landsstýrismannin við hesum broytingunum.

Í 2018 mælti stýrið landsstýrismanninum til at gera broytingar í lógini um arbeiðsloysisstrygging soleiðis, at ALS fær heimild at taka ímóti ALS-gjaldi av øðrum inntøkum enn a-inntøkum. Hendan broytingin hevði millum annað havt við sær, at ALS hevði havt heimild at tikið ímóti ALS-gjaldi av inntøkum, sum fólk vinna sær í útlondum. Harvið høvdu summir av hesum persónum kunna verið arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum fult í trá við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd. Talan er serliga um inntøkur hjá fólki, sum starvast í norðurlondum, har avtala millum Føroyar og hesi norðurlond gera, at hesi fólk kunnu velja at verða sosialt tryggjaði í Føroyum heldur enn í landinum, tey arbeiða.

Lógarbroytingin varð borin í Løgtingið í oktober mánaði men fall burtur, tí málið ikki var liðugt viðgjørt, tá tingsetan endaði fyri summarfrítíðina í fjør.

Tað er í løtuni ikki greitt, hvør lagnan hjá hesum lógaruppskotinum verður, men vónandi verður tað lagt aftur fyri Tingið seinni í ár.



## Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2019 var samlaða upphæddin 66.600 tús. krónur.

## Trygdargrunnur fiskivinnunar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 960 tús. krónur í 2019.

Tvey starvsfólk fóru eftir drúgva starvstíð hjá Trygdargrunninum úr starvi í 2019. Onnur hevði starvast í samfull 43 ár hjá grunninum. Hin hevði starvast í stívliga 32 ár hjá grunninum, tá hon gavst.

Eitt starvsfólk er í hesum sambandi flutt frá ALS til Trygdargrunnin at starvast.

Sambært samstarvsavtaluni millum ALS og Trygdargrunnin er viðkomandi saman við deildarleiðaranum formliga í starvi hjá ALS, men arbeiðir fyri Trygdargrunnin, og Trygdargrunnurin ber ALS allar útreiðslur av hesum aftur.

Samlaða upphæddin, sum Trygdargrunnurin bar ALS aftur fyri starvsfólkakostnaðir í 2019 var 762.239 krónur.

## Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2017.

**Í stýrinum sita**
Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg F. Hansen
Jan Mortensen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Stefan í Skorini



# BÚSKAPUR
# 2019

**Inngjøldini hækkaðu aftur í 2019. ALS-gjaldið hevur verið óbroytt 1,25% síðani 1. januar 2012, og síðani hevur verið ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá ALS.**

Í 2018 vóru samlaðu inngjøldini 231,9 mió. krónur, og í 2019 komu tey upp á 245,1 mió. krónur. Ein vøkstur á 13,3 mió. krónur svarandi til 5,7%.

Hetta er tað mesta, samlaðu inngjøldini hava verið í 28-ára søguni hjá Arbeiðsloysisskipanini.

ALS-gjaldið hevur verið óbroytt seinastu átta árini, og tí stavar vøksturin í samlaðu inngjøldunum frá, at samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum aftur hækkaðu í 2019 – hesaferð við 6,8% upp í 10,1 mia. krónur.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum, síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið, meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini. **Sí mynd 11.**

**Mynd 11** / ALS-gjald og samlað inngjøld 1992 – 2019



# Útgjøldini halda á at minka

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi síðani ársbyrjan í 2011, tá tað var upp á tað mesta í nýggjari tíð. Samlaðu útgjøldini eru neyvt knýtt at arbeiðsloysinum, og tí eru samlaðu útgjøldini eisini minkað støðugt hesi seinastu átta árini.

Í 2019 vóru samlaðu útgjøldini 51,2 mió. krónur, sum eru 20,1 mió. krónur - svarandi til stívliga 20% - minni enn í 2018, tá tey vóru 71,3 mió. krónur.

Samlaðu útgjøldini í 2019 vóru 28 mió. krónur – 36% - lægri, enn tey vóru fyrsta árið, ALS virkaði - í 1992. Tá er hædd ikki tikin fyri prísvøkstrinum, sum hevur verið hesi 27 árini síðani tá.



Vanligu útgjøldini minkaðu við einum triðingi úr 45,4 mió. krónum niður í 28,9 mió. krónur. Útgjøldini um fiskavirkisskipanina lækkaðu úr 17 mió. krónum niður í 13,8 mió. krónur. Ein lækking á 2,5 mió. krónur svarandi til sløk 19%.

Talið av fólkum, sum fingu útgjald um fiskavirkisskipanina, var miðal 241 fyri hvørt útgjaldsskeið í 2019. Tað var væl lægri enn árið frammanundan, tá talið var 330. Miðalupphæddin hvørt útgjaldsskeið var tó nakað hægri í 2019 samanborið við 2018.

Í apríl mánaði í 2018 samtykti Føroya Løgting eina pensjónsnýskipan, og frá 1. januar 2019 hevur ALS rindað eftirløn av arbeiðsloysisstuðlinum. Hetta fyrsta árið rindaði ALS samanlagt 2,3 mió. krónur í inngjøldum til eftirlønarskipanir.

Kostnaðirnir av starvsvenjingini hava verið støðugt minkandi síðani 2012, og í 2019 vóru teir komnir niður á 2,2 mió. krónur samanborið við 3,3 mió. krónur árið fyri. Hetta er ein minking á stívliga ein triðing.

Peningaligi týdningurin fyri ALS av starvsvenjingini er avmarkaður, tí upphæddirnar, sum vera goldnar út í sambandi við starvsvenjingar, høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvsvenjing verið.

Upphæddirnar, ið hava verið brúktar til arbeiðsmarknaðarátøk og førleikamenning hjá viðskiftafólkunum, vóru vaksandi fram til 2014, men so hvørt sum arbeiðsloysið er minkað, er virksemið lagað til, og minni upphæddir eru eisini brúktar til hetta endamál. Upphæddin í 2018 var slakar 4,2 mió. krónur, meðan tað vóru brúktar slakar 3,2 mió. krónur í 2019. Minkingin er sløk ein mió. krónur – svarandi til stívliga 23%.

Ein lutfalsliga stórur partur av samlaðu upphæddini verður brúktur til rakstur av Fjølsmiðjuni og tí virksemi, har er. **Sí mynd 12 og mynd 13.**

**Mynd 12** / Samlað útgjøld 1992 - 2019




**Mynd 13** / Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini

| Mió. krónur | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 28,9 | 45,4 | 57,1 | 71,5 | 92,2 | 120,8 |
| Fiskavirkisskipanin | 13,8 | 17,0 | 15,4 | 20,2 | 24,3 | 22,6 |
| Eftirlønir | 2,3 | - | - | - | - | - |
| Starvsvenjing | 2,2 | 3,3 | 3,7 | 5,8 | 7,5 | 11,7 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 0,9 | 1,3 | 1,5 | 1,9 | 2,3 | 2,9 |
| Førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk | 3,2 | 4,2 | 4,2 | 4,8 | 6,5 | 8,0 |
| **Íalt** | **51,2** | **71,3** | **81,8** | **104,0** | **132,8** | **166,0** |

**Mynd 14** / Tal av ársverkum



*Rakstrarkostnaðurin í 2019 var 5,0 mió. krónur. Tað er 100 tús. krónur minni enn í 2018*

## Starvsfólkakostnaðir

Talið av starvsfólkum hevur verið minkandi seinnu árini og er farið úr 43 ársverkum í 2015 niður í 29 í 2019. Komandi ár verður talið av ársverkum  væntandi nakað lægri.

Minkandi arbeiðsloysi, nýggj kt-skipan, umskipingar og tillagingar eru høvuðsorsøkir til, at starvsfólkahópurin er minkaður seinastu árini.

Tað er so, at ALS í enn størri mun enn áður hevur sett sær fyri at hava ein virknan leiklut í, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis. Hetta verður gjørt á tann hátt, at sambandið og samstarvið við viðskiftafólkini er víðkað og betrað soleiðis, at vit betri kunnu hjálpa fólki aftur á arbeiðsmarknaðin, eisini so at neiligu árinini av arbeiðsloysi verða so avmarkað sum yvirhøvur til ber.

Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 14,8 mió. krónur í 2018. Í 2019 vóru tær 14,3 mió. krónur, sum var ein sløk hálv mió. krónur minni enn árið fyri. Orsøkin er minkingin í talinum av ársverkum. **Sí mynd 14.**

**Mynd 15** / Samlaðir rakstrarkostnaðir 2004 – 2019 í ársins prísum




## Rakstrarkostnaðir

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir í 2019 vóru 5,0 mió. krónur. Tað er 100 tús. krónur minni enn árið frammanundan, tá tær vóru 5,1 mió. krónur.

Harvið ber til at staðfesta, at vanligu rakstrarkostnaðirnir nú eru júst teir somu, sum teir vóru fyri 15 árum síðani í 2004. Tá er hædd ikki tikin fyri prísvøkstri og broyttum roknskaparligum meginreglum.

Við í rakstarkostnaðunum eru bæði inntøkur og útreiðslur av Losjuni, sum ALS keypti á sumri í 2016. **Sí mynd 15.**

Verður hædd tikin fyri roknskapartøkniligu broytingunum og eingangsútreiðslum, so er tað vorðið alsamt bíligari at reka ALS hesi seinastu nógvu árini.

Mynd 16 vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg síðani 2004. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum.

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 13,6 mió. krónum í 2010 niður í 5,5 mió. krónur í 2019. Ein minking á 60% eftir níggju árum.

Íroknað í mvg-upphæddini í 2019 eru 320 tús. krónur, sum er mvg av vørum og tænastum frá útlendskum veitarum fyri bæði 2018 og 2019. Høvdu hesar upphæddir verið rætt tíðaravmarkaðar, so hevði mvg-upphæddin í 2018 verið 178 tús. krónur hægri, meðan mvg-upphæddin fyri 2019 hevði verið hesar somu 178 tús. krónurnar lægri enn tær eru í roknskapinum. **Sí mynd 16.**

Gongdin við munandi sparingum seinnu árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining. Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur fara at minka aftur komandi ár, og at ALS framhaldandi verður bíligari at reka.

**Mynd 16** / Fyrisitingarútreiðslur, avskrivingar og mvg í føstum 2004-prísum



# Úrslit og eginogn

Ársúrslit 2019

**200** mió. kr.

2018: 131,3

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt avlop á 174,9 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt avlop á 140,6 mió. krónur í 2018.

Avskrivingarnar í 2019 vóru 228 tús. krónur, sum er tað sama sum árið fyri.

Í 2014 vóru allar ognir burtursæð frá grundøkinum og bygninginum við Tinghúsvegin endaliga avskrivaðar, og tá øll keyp, sum frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað yvir fleiri ár, nú verða útreiðsluførd yvir raksturin, so eru samlaðu avskrivingarnar minkaðar munandi samanborið við 2014. Í árunum sum koma, verða tað bara bygningarnir við Tinghúsvegin – tað er ALS-bygningurin og Losjan - sum verða avskrivaðir.

Virðisbrævaognirnar vuksu úr 648,8 mió. krónum við árslok 2018 til 861,8 mió. krónur við árslok 2019 – hetta svarar til ein vøkstur á júst ein triðing.

Munandi batar vóru í fíggjaravkastinum í 2019 í mun til undanfarna árið. Í 2018 var fíggjaravkastið ein missur á 8,3 mió. krónur, svarandi til -1,4% av virðisbrævaognunum. Í 2019 var fíggjaravkastið 26,1 mió. krónur, svarandi til eina renting á +3,5%.

ALS hevur ein varnan íløgupolitik, har dentur verður lagdur á at varðveita fíggjarognirnar og at tryggja, at neyðugt gjaldføri altíð er tókt, tá tørvur er á tí. Fyri at avmarka váðan mest møguligt verður størsti parturin tí settur í lánsbrøv. Ein minni partur – í mesta lagi 20% av samlaðu upphæddini, sum verður sett í virðisbrøv - verður settur í alheimspartabrøv.

Avkastið av partabrøvunum var gott í 2019. Samlað góvu tey eitt avkast á 19,1 mió. krónur, sum svarar til eina renting á oman fyri 27%.

Avkastið av lánsbrøvunum var slakar 7,5 mió. krónur svarandi til 1,1%.

Ársúrslitið batnaði áttanda árið á rað og gjørdist eitt avlop á 199,7 mió. krónur í mun til 131,3 mió. krónur árið frammanundan. Talan er harvið um eina betring á 68,4 mió. krónur, sum svarar til stívliga 52%. **Sí mynd 17.**

Við árslok í 2019 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 861,8 mió. krónur, sum var 213 mió. krónur meiri enn eitt ár frammanundan.

í 2019 er tøki peningurin minkaður munandi úr 22,6 mió. krónum við árslok í 2018 niður í 7,4 mió. krónur við árslok 2019. Orsøkin er, at raksturin gav stórt avlop í 2018, og at gjaldførið tí var serliga gott við árslok tað árið. Árið 2019 royndist enn betri, og avlopið var helvtina størri enn í 2018, men størri partur av avlopsgjaldførinum hevur áhaldandi verið sett í virðisbrøv gjøgnum árið, og tí var tøki peningurin við árslok 2019 væl minni enn við árslok eitt ár frammanundan. Tað, at peningarstovnarnir nú eru farnir at taka gjald fyri innistandandi – negativa rentu – ger eisini, at avlopsgjaldførið oftari verður flutt av kontu í peningastovnunum og sett í virðisbrøv.

*Munandi batar vóru í fíggjar-avkastinum í 2019 í mun til undanfarna árið*

**Mynd 17** / Ársúrslit 1992 - 2019




**Mynd 18** / Eginogn 1992 – 2019




Við ársbyrjan í 2019 var eginognin 711,3 mió. krónur, og við árslok var hon vaksin upp í 911 mió. krónur.

Tá eginognin frammanundan hesum var størst, tað var í august mánaði í 2009, var hon stívliga 742 mió. krónur. Nú stívliga 10 ár seinni ber til at staðfesta, at eginognin nú er tann størsta, hon nakrantíð hevur verið í søguni hjá ALS. Gongdin hesi seinastu tíggju árini ella so vísir, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini kann vikna skjótt. Tað vísir eisini týdningin av, at skipanin er í eini tryggari legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

Við gongdini, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu árini og við teimum tillagingum, sum eru gjørdar á Arbeiðsloysisskipanina, er neiliga gongdin vend, og skipanin vorðin munandi betri før fyri at standa ímóti komandi bakkastum – sum eitt nú avleiðingarnar av korona-smittuni í 2020. **Sí mynd 18.**

# Útlit fyri 2020

Við árslok 2019 og nakað inn í 2020 vóru útlitini fyri komandi árið sera góð.

Eingi skýggj vóru at hóma, og útlitini fyri framhaldandi nógvum virksemi og lágum arbeiðsloysi í Føroyum vóru framúr.

Alt hetta broyttist kortini longu í februar mánaði, tá fyrsti føroyingurin var staðfestur smittaður við herviligu korona-smittuni.

Næstu mánaðirnar sendu privatir føroyskir arbeiðsgevarar oman fyri 4.000 fólk til hús, tí virksemið hjá hesum fyritøkum minkaði orsakað av avleiðingunum av korona-smittuni.

Síðani er talið av fólki, sum fáa lønarískoyti, minkað nógv og er nú farið niður um 2.000.

Lokadagurin fyri serligu korona-lóggávuna er settur at vera 30. juni.

Hvør støðan verður, tá komið verður út í juli mánað og út á heystið, er torført at spáa um, men tað er sannlíkt, at vanliga arbeiðsloysið fer at verða hægri tað, ið eftir er av árinum og møguliga inn í komandi ár eisini, enn tað hevur verið í nógv ár.

Arbeiðsloysisskipanin er enn væl fyri fíggjarliga, og hóast arbeiðsloysið sannlíkt verður nakað hægri komandi árini, enn tað hevur verið seinastu árini, so megnar ALS-grunnurin væl at lofta fíggjarligu avbjóðingunum av einum hægri arbeiðsloysi í nógv ár.

Við verandi eginogn megnar skipanin at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini 8 ár.

Tí verður tað ikki mett at verða neyðugt við størri inntrivum ella broytingum í grundleggjandi fyritreytunum fyri grunnin.

*Við verandi eginogn megnar skipanin at standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini 8 ár.*



## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2019 til 31. desember 2019 vísir eitt avlop á 199.694.094 krónur móti einum avlopi á 131.276.639 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2018 til 31. desember 2018.

Tillagingarnar í skipanini, sum eru framdar, vísa seg at hava ætlaða virknaðin, og stýrið og stjórn eru nøgd við úrslitið fyri 2019.

Gjaldførið er gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2019 við 188,5 mió. krónum úr 683.167.987 krónum upp í 871.629.627 krónur.

Gjaldførið í 2019

**871** mió. kr.

2018: 683 mió. kr.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Hósdagin 12. mars 2020 kunngjørdi Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, at føroyska samfelagið skuldi niður í ferð orsakað av vandunum við korona-smittuni, sum var komin til Føroyar.

Til tess at tálma og basa korona-smittuni høvdu myndugleikarnir tá nøkur tilmæli til Føroya fólk, sum millum annað vóru, at:

- Fólk ikki ferðaðust í onnur lond uttan so, at tað var hægst neyðugt
- Skúlanæmingar skuldu ikki møta í skúla
- Øll starvsfólk á almenna arbeiðsmarknaðinum skuldu arbeiða heimanífrá, tó undantikin tey, sum røktu mest viðbreknu samfelagsuppgávurnar.
- Tiltøk, har fleiri enn 100 fólk savnaðust, vóru útsett ella avlýst.

Hesi tiltøkini, sum myndugleikarnir settu í verk, vóru seinni longd, og ikki fyrr enn einar fimm vikur senni var latið spakuliga upp aftur, og heldur meiri ferð kom á samfelagshjólini og partar av føroyska búskapinum.

Avleiðingarnar av korona-smittuni vístu seg skjótt, og tær skuldu vísa seg at verða álvarsamar.

Longu dagin eftir at løgmaður hevði kunngjørt, at Føroyar fóru niður í ferð, gjørdi Føroya Arbeiðsgevarafelag vart við, at skuldi sleppast undan hópuppsøgnum hjá føroyskum arbeiðsgevarum, so var neyðugt alt fyri eitt at seta ein hjálparpakka í gildi, sum tryggjaði starvsfólkum á privata arbeiðsmarknaðinum okkurt slag av lønarískoyti.

Leygardagin 14. mars var leiðslan á ALS saman við stýrisformanninum á fundi við Umhvørvis- og Vinnumálaráðið at tosa um, hvussu ein slíkur hjálparpakki kundi sæð út, og longu seinni sama kvøld vóru fyrstu uppskotini til broytingar í løgum og kunngerðum klár.

Stýrið fyri ALS hittist sunnudagin 15. mars, og nýggj uppskot til løgfrøðiliga broytingar vóru gjørd.

Tað var greitt, at tað vóru einir 16-17 tús. løntakarar á privata arbeiðsmarknaðinum, men tað var eyðsæð ikki greitt, hvussu nógvir av hesum fóru at fáa lønarískoyti úr hesum fyrsta hjálparpakkanum.

Tað var mett, at talið kundi fara at verða um einar 4-5 tús. løntakarar, og at hjálparpakkin kundi fara at kosta ALS á leið 60 til 90 mió. krónur um mánaðin fram til 30. juni, tá sólseturdagurin fyri hesa lógina var settur at vera. Samanlagt einar 200 til 300 mió. krónur.

Mett var, at ALS-grunnurin – eftir fleiri ár við lágum arbeiðsloysi - var so mikið væl fyri fíggjarliga, at hann megnaði at lofta fíggjarligu avbjóðingunum við hesi serligu korona-skipanini.

Seinni hendan sama sunnudagin almannakunngjørdi landsstýrið hjálparpakka 1.

Á ALS hildu fyrireikingarnar til serligu skipanina fram. Mikudagin 18. mars vóru lógarbroytingarnar lýstar, og mánadagin 23. mars var klárt at taka ímóti tilmeldingum til hesa serligu korona-skipanina.

Tað gingu bara nakrir heilt fáir dagar, so hevði ALS fingið oman fyri 3.000 umsóknir um lønarískoyti. Fleiri umsóknir komu sum dagarnir gingu, og tað stóð á hjá starvsfólkunum hjá ALS at viðgera og játta allar umsóknirnar, sum komu frá arbeiðsgevarunum.




*Tá talið av fólki, sum fingu lønarískoyti, var í hæddini, vóru tað 4.320 fólk*

Longu 30. mars fingu tey fyrstu stívliga 1.600 fólkini lønarískoyti, og bert eina viku seinni rindaði ALS aftur lønarískoyti út. Hesaferð fingu sløk 3.000 fólk lønarískoyti.

Tá talið av fólki, sum fingu lønarískoyti, var í hæddini, vóru tað 4.320 fólk, og samlaða útgjaldið var á leið 45 mió. krónur um mánaðin. Tí er væntandi, at hendan serliga korona-skipanin ikki fer at verða so kostnaðarmikil sum upprunaliga væntað.

Fram til og við mai mánað eru slakar 100 mió. krónur goldnar út í lønarískoyti í korona-skipanini, og metingarnar eru, at samlaði kostnaðurin av skipanini sannlíkt verður einar 115 mió. krónur, tá skipanin fer úr gildið 30. juni 2020.

Orsakað av óvæntaðu eyka útreiðslunum til lønarískoyti til fólk í korona-skipani er hugsandi, at Arbeiðsloysisskipanin fer at hava hall í 2020.



# ÁRSROKNSKAPUR


| | |
|---|---|
| Nýttur roknskaparháttur | 44 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2019 | 47 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2019 | 48 |
| Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2019 | 50 |
| Notur til ársfrásøgnina | 52 |




# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá ALS fyri 2019 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020. Talan er um tvær tillagingar í mun til ársroknskaparlógina.

Tann fyrra tillagingin er, at aðrar materiellar ognir enn grundøki og bygningar verða ikki tiknar við sum ognir í fíggjarstøðuni. Tann seinna tillagingin er, at mettur framtíðarkostnaður viðvíkjandi arbeiðsloysisstuðuli til tey arbeiðsleysu, sum eru í skipanini verður ikki tikin við í fíggjarstøðuna, sum ein avsett skylda. Metta skyldan verður hinvegin upplýst sum ein eventualskylda í einari notu til ársroknskapin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.
Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

# Rakstrarroknskapurin

### Inngjøld

Inngjøld frá arbeiðsgevarum og løntakarum verða innroknað í rakstrarroknskapin, tá lønin, sum ALS gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inngjøld frá sjálvstøðugum vinnurekandi og sjálvbodnum arbeiðsloysistryggingum verða innroknað, tá trygging og váðaskifti er farið fram áðrenn árslok

### Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys

Útgjøld til vanligan arbeiðsloysisstuðul, til arbeiðsloysisstuðul umvegis fiskavirkisskipanina, og til útreiðslur til starvsvenjing verða innroknaði í rakstrarroknskapinum, tá hesi eru útgoldin. Útgjøldini eru tíðargreinaði soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men eru upptjent í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni við árslok í roknskaparárinum.

Útreiðslur til arbeiðsleys fevnir um rakstrarútreiðslur av Fjølsmiðjuni umframt skeiðsútreiðslur til arbeiðsleys.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til lýsingar, umsiting, høli, innbúgv, edv, viðlíkahald, tap upp á skuldarar v.m. Harumframt verða vanligar íløgur td. í rakstrartól og innbúgv útreiðsluførd sum aðrir uttanhýsis kostnaðir.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar fevna um ársins av og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentuinntøkur og kostnaðir.

### Skattur av ársúrslitinum

Skattur og avgjøld fevna um meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu

# Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**
Grundøki og bygningar verða virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Viðvíkjandi aðrari materiellari støðisogn er gjørd tillaging í mun til ársroknskaparlógina soleiðis at hesar ognir ikki verða ognarførdar.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og restvirðum

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 50 ár | 32 % |

Vinningur ella tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn verða gjørd upp sum munurin millum søluupphæddina, við frádrátti av sølukostnaði, og roknskaparliga virðið av støðisognini søludagin. Vinningur ella tap verða innroknað undir avskrivingar í rakstrarroknskapinum.

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**
Kapitalpartar verða virðisásettir til dagsvirði.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði við frádrátti av væntaðum tapum.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**
Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (børskursin) við roknskaparlok. Dagsvirðið verður ásett út frá seinast skrásetta sølukursinum.

**Skyldur**
Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

# Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar grunsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening grunsins við ársbyrjan og ársenda.

**Peningastreymur frá rakstrarvirksemi**
Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir og broytingar í arbeiðskapitali. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

**Peningastreymur frá íløguvirksemi**
Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn

**Peningastreymur frá fíggingarvirksemi**
Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av stovnsfæi grunsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum og gjaldan av avdráttum.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er uttan týdning.

**Yvirlit yvir høvuðs og lyklatøl**
Frágreiðing til lykatølini.

**Høvuðsavkast** $\frac{\text{Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100}}{\text{Ognir til samans}}$

**Tryggleikastig** $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ognir til samans við árslok}}$

**Eginpeningsavkast** $\frac{\text{Vanlig úrslit eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$



# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2019

| | Nota | 2019 kr. | 2018 tkr. |
|---|---|---|---|
| Inngjøld | | 245.150.604 | 231.859 |
| Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | | - 51.243.863 | - 71.280 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | - 4.396.506 | - 5.002 |
| **Bruttoúrslit** | | **189.510.235** | **155.577** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -14.342.274 | - 14.796 |
| Av og niðurskrivingar | | - 227.682 | - 228 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **174.940.279** | **140.553** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 26.064.577 | -8.324 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **201.004.856** | **132.229** |
| Skattur av ársúrslitinum | | - 1.310.762 | - 952 |
| **Ársúrslit** | | **199.694.094** | **131.277** |
| **Yvirskotsbýti** | | | |
| Flutt úrslit | | 199.694.094 | 131.277 |
| | | **199.694.094** | **131.277** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2019

| | Nota | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| **OGN** | | kr. | tkr. |
| Grundøki og bygningar | | 34.936.536 | 34.001 |
| **Materiell støðisogn** | **2** | **34.936.536** | **34.001** |
| | | | |
| Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | | 10.085.482 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **3** | **10.085.482** | **0** |
| | | | |
| **Støðisogn til samans** | | **45.022.018** | **34.001** |
| | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 12.416.629 | 11.685 |
| Onnur áogn | | 12.750 | 6 |
| Tíðaravmarkingar | | 0 | 0 |
| **Áogn** | | **12.429.379** | **11.691** |
| | | | |
| **Virðisbrøv** | **4** | **851.753.623** | **648.840** |
| **Tøkur peningur** | | **7.446.625** | **22.637** |
| | | | |
| **Ogn í umferð til samans** | | **871.629.627** | **683.168** |
| | | | |
| **Ogn til samans** | | **916.651.645** | **717.169** |



# Fíggjarstøða tann 31. desember 2019

| | Nota | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | kr. | tkr. |
| Stovnsfæ | | 93.840.006 | 93.840 |
| Fluttur vinningur | | 817.127.801 | 617.434 |
| **Eginogn** | **5** | **910.967.807** | **711.274** |
| | | | |
| Vøru og tænastuskuld | | 997.278 | 1.123 |
| Onnur skuld | | 4.686.560 | 4.772 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **5.683.838** | **5.895** |
| | | | |
| **Skuld til samans** | | **5.683.838** | **5.895** |
| | | | |
| **Skyldur til samans** | | **916.651.645** | **717.169** |
| | | | |
| Eventualskyldur v.m. | 6 | | |
| Nærstandandi partar og ognarviðurskifti | 7 | | |

# Peningastreymsuppgerð
# 1. januar - 31. desember 2019

| | Nota | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| Ársúrslit | | 199.694.094 | 131.277 |
| Javningar | | 227.682 | 228 |
| Broyting í rakstrarkapitali | | - 949.764 | - 783 |
| **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarpostar** | | **198.972.012** | **130.722** |
| | | | |
| **Peningastreymur frá rakstrarvirksemi** | | **198.972.012** | **130.722** |
| | | | |
| Keyp av materiellari støðisogn | | - 1.163.592 | - 1.434 |
| Keyp av fíggjarligari støðisogn | | - 10.085.482 | 0 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **- 11.249.074** | **- 1.434** |
| | | | |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **187.722.938** | **129.288** |
| | | | |
| Tøkur peningur | | 22.637.007 | 4.931 |
| Virðisbrøv | | 648.840.303 | 537.258 |
| **Tøkur peningur 1. januar 2019** | | **671.477.310** | **542.189** |
| | | | |
| Tøkur peningur 31. desember 2019 | | 859.200.248 | 671.477 |
| | | | |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 7.446.625 | 22.637 |
| Virðisbrøv | | 851.753.623 | 648.840 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2019** | | **859.200.248** | **671.477** |





# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 1 | **STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR** | kr. | tkr. |
| | Lønir | 12.090.885 | 12.485 |
| | Eftirlønartryggingar | 1.470.257 | 1.551 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 655.904 | 613 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | 125.228 | 147 |
| | | **14.342.274** | **14.796** |

Umframt starvsfólkaútreiðslurnar omanfyri er starvsfólkakostnaður eisini innroknaður, sum partur av útreiðslum til arbeiðsleys. Hesin kostnaður er í sambandi við Fjølsmiðjuna og var fyri 2019 til samans 1.947 tkr. í mun til 1.891 tkr. í 2018.

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Av hesum er samsýning til: | | |
| | Stjórn og stýri | 1.178.492 | 1.201 |
| | | **1.178.492** | **1.201** |
| | Starvsfólkatal í miðal | 29 | 33 |

| | | |
|---|---|---|
| 2 | **MATERIELL STØÐISOGN** | |
| | **Grundøki og bygningar** | |
| | Keypsvirði 1. januar 2019 | 36.565.963 |
| | Tilgongd í árinum | 1.163.595 |
| | Keypsvirði | 37.729.558 |
| | Av og niðurskrivingar 1. januar 2019 | 2.565.340 |
| | Avskrivingar í árinum | 227.682 |
| | Av og niðurskrivingar | 2.793.022 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2019** | **34.936.536** |

| | | |
|---|---|---|
| 3 | **FÍGGJARLIG STØÐISOGN** | |
| | **Onnur virðisbrøv og kapitalpartar** | |
| | Keypsvirði 1. januar 2019 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 10.085.482 |
| | Keypsvirði | 10.085.482 |
| | Uppskrivingar 1. januar 2019 | 0 |
| | Uppkrivingar í árinum | 0 |
| | Uppskrivingar 31. desember 2019 | 0 |
| | Niðurskrivingar 1. januar 2019 | 0 |
| | Niðurskrivingar í árinum | 0 |
| | Av og niðurskrivingar | 0 |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember 2019** | **10.085.482** |

| | | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 4 | **VIRÐISBRØV** | kr. | tkr. |
| | Lánsbrøv Føroya Landstýri | 17.268.840 | 11.283 |
| | Onnur virðisbrøv | 834.484.783 | 637.557 |
| | | **851.753.623** | **648.840** |

| | | Stovnsfæ | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| 5 | **EGINOGN** | | | |
| | Salda við ársbyrjan 1. januar 2019 | 93.840.006 | 617.433.707 | 711.273.713 |
| | Ársúrslit | 0 | 199.694.094 | 199.694.094 |
| | **Eginogn** | **93.840.006** | **817.127.801** | **910.967.807** |

6 **EVENTUALSKYLDUR V.M.**

Við árslok 2019 vóru 196 fólk, sum høvdu rætt til arbeiðsloysisstuðul. Um øll hesi vera fulltíðararbeiðsleys til tey hava brúkt allar eftirverandi dagar við rætti til arbeiðsloysisstuðul, so verður samlaði kostnaðurin hjá ALS av hesum umleið 64 mió. kr. í árunum 2020 og 2021.

**AÐRAR EVENTUALSKYLDUR**

Grunnurin hevur leigusáttmálar, har leiguskyldan í uppsagnartíðini er 39 tkr.

7 **NÆRSTANDANDI PARTAR**

Føroya Landstýri velur stýrið í ALS.
ALS hevur avtalu við Trygdargrunn Fiskivinnunar um, at ALS hevur um hendi alla umsiting av virksemi Trygdargrunni Fiskivinnunar.

**ALS**
Tinghúsvegur 14

Tel 34 95 50
als@als.fo
www.als.fo